Hvør vinnandi maður
Hvør vinnandi kvinna
minst ein lut í
Sjóvinnulánsgrunninum.

Sækketvistlærred **48 Øre**

Et Parti svært, ubleget realiseres mindst 20 m. samme Kvalitet 125 cm. bred **96 Øre** pr. m. Ubl. **Skjorter 200 Øre** i lille og middel Størrelse, stor **225 Øre,** svære uldne **Herresokker 100 Øre,** svært ubl. **Flonel** 70 cm. bred **65 Øre** pr. m. **Viskestykker 36 Øre. Vaffelhaandklæder 48 Øre,** kulørte **Lommetørklæder** 45×45 cm. **325 Øre** pr. Dus.

Fuld Tilfredshed eller Pengene tilbage. Forlang illustreret Katalog.

SÆKKELAGERET, Sct. Annæ Plads 10. **København K.**

Kunngerð.

Valstýrið í Tórshavn kunnger her, at fólkatingsval verður í Tórshavnar valdømi miðvikudag hin 29. mai 1929 í Tingstovuni í Tórshavn.

Stemmað verður í tíðini frá kl. 10 fyrra part til kl. 1 seinna part og tínæst frá kl. 3 seinna part til kl. 8 seinna part, og verður tá ikki givið uppat, so leingi veljarar enn koma at stemma.

Tórshavn, 3. apríl 1929.

Fyri valstýrið
Jens Pauli Andreasen.

„Hann uppøsir fólkið".

(Týtt eftir Íslendskum).

II.

Tað er ikki tørvur á at lesa evangeliuni við nøkrum serstøkum eftirtonkum til tess at koma eftir tí, at tað er mannfjøld á Gýðingalandi, sum vil gera Jesu til kong. Allir kenna frásøgnina um tá Jesu reið inn í Jerúsalem, og hvussu hann tá var fagnaður av fólkinum sum ein kongur við miklum hátíðleika. Og tað er ikki minni greidligt á øðrum støðum í evangeliunum, men sum færri munnu hava givið æns. Í øllum fýra evangeliunum er frásagt, at Jesus mettaði mannfjøld við einum sindri av breyði og fiski. Bæði Markusar- og Matheusarevangelium siga soleiðis frá, at skiligt er, at einhvør mikil øsing er á vási millum fólksins, sum var vitni til hetta kraftarverk. Bæði evangeliuni flyta fram nærum einsljóðandi setning, hvar greitt verður frá undurverkinum, og ljóðar hann so: »Og straks bað hann lærusveinar sínar fara í bátin og rógva yvir um undan sær, ímeðan hann slapp sær frá mannfjøldini«.

Tað er einki at ivast um, at tað er okkurt stórvegis á vási. Jesu *noyðir* lærusveinar sínar at fara í bátin. Hann vil vera einsamallur fyri at sleppa sær undan mannfjøldini. Av hesum evangeliunum sæst ikki, hvat orsøkin til øsingina var, men Jóhannesar evangelium gevur frágreiðingina. Táið greitt er frá undirverkinum, tá er sagt soleiðis frá: »Táið Jesus var varur við tað, at teir ætlaðu at koma og taka hann við makt og gera hann til kong, fór hann aftur avsíðis upp á fjallið einsamallur«.

Og tá verður greitt, hvussu háttað øsingin er: Mannfjøldin, sum hevur fingið slókt hungur sín, vil gera Jesus til kong og ætlar at taka hann við valdi. Sanniliga hava lærusveinarnir vilja studla til, og tessvegna sleppur Jesus sær fyrst frá teimum, og síðan loysir hann seg frá mannfjøldini.

Men tá er eftir at gera sær greitt, hvat voldað hevur hesa trá fólksins til at gera Jesus til kong. Hvat er tað sum rembist so í fólkinum, at tey enntá við valdi vilja taka Jesu fyri at hann skal fremja vilja teirra?

Sumir halda, at atstøðurnar hava verið tjóðskaparligar. Hjá fólkinum er vaknað trúgvin á tað, at Jesus var hin fyrijáttaði Mesias, og tá var tað hansara verk at frelsa tjóðina undan yvirvaldi Rómaranna og gera hana mikla og velduga, so sum hon hevði verið á døgum Davids og Salomons.

Men frásøgnir evangelistanna geva ikki atstøður til at halda, at so hevur verið. Tær flyta ikki eitt sindur fram, sum bendur á tað, at tað hevur verið fólksins ætlan, at gera uppreistur móti Rómarunum við Jesu sum oddamanni, heldur ikki er eftir Jesu eitt einasta orð, sum vitnar um, at hann hevur verið ímóti rómarskum yvirvaldi, ella hevur birt upp undir sjálvræðishuga tjóðarinnar. Um so var, at menn trúu tí, at Jesus var Messias, var tað nóg mikið til at geva sjálvræðistrá tjóðarinnar vind undir veingirnar, tí so hevði verið litið á, at tað sjálvandi var Messiasar verk at loysa tjóðina undan fremmandum valdi. Men móti hesi áskoðan skal bendast á tað, at tað er ikki boðskapur Jesu um tað, at hann er Messias, sum er tað fyrsta til at gera hann fagnaðan millum fólkið. Lærusveinar flokkaðust um hann, hóast hann ikki við einum orði boðaði frá, at hann var Messias. Lat okkum leggja til merkis frásøgn Markusarapostuls, sum hildin er at vera hin mest álítandi heimild um lív Jesu, og hetta er tað stutt áður hann fer av stað til Jerusalems fyri seinastu ferð, at hann spyr lærusveinar sínar, hvønn fólk siga hann at vera. Og teir svaraðu tí, at sumir siga, at hann er Johannes doyppari og aðrir Elias og aftur aðrir ein av profetunum. Teir nevndu einki um í svari sínum, at nakar hevði gitt hann at vera Messias. Tá spurdi hann lærusveinar sínar: »Men hvønn halda tit meg vera?« Tá gav Pætur hitt kenda svarið: »Tú ert hin livandi sonur Guðs«.

Henda frásøgn sýnir ikki bert tað, at lærusveinarnir ikki høvdu verið varir við ta trúgv hjá tjóðini, at Jesus var Messias, men meira hitt, at Jesus ikki hevði boðað tað fyri lærusveinum sínum. Av hesum sæst, at tað ikki var fyrst og fremst trúgvin á Messiasartign Jesu, sum gav honum fylgisveinar. Ennmeir kann hugsast, at trúgvin á tað, at Jesus var Messias, tørvaði ikki at vera so sterk, at menn fóru at líta á tað, at hann skuldi bróta tað okið sum fremmanda yvirvaldið hevði á tjóðini. Vónirnar sum tjóðin ól í brósti um Messias, vóru ymiskar. Hann var frelsari tjóðarinnar eftir trúgv hennara. Hann var lekjarin fyri hvørja neyð, sum tjóðin píndist av.... Vónirnar um hann vóru tí misjavnar eins og lagna mannanna er misjøvn.

Men tað sum týðuligast sýnir, at øsingin ikki er í sambandi við Rómverjar og yvirvald teirra, er tað, hvørjir flokkar skipast um hann við og ímóti.

Fremstir í mótstøðuparti hansara eru teir menn, sum vóru mest hugaðir fyri at loysa tjóðina undan fremmanda yvirvaldinum, so sum Farisearnir. Men umboðsmaður rómverska valdsins, Pontius Pilatus, finnur onga søk hjá Jesu og sær onga atstøðu til at óttast ávirkan hansara. Og tó at rópt verður eftir honum og sagt, at Jesus sítur at gjalda keisaranum skatt, og at Pilatus ikki er vinur keisarans, um hann gevur Jesu leysan, tá er tað ikki umhugsan hansara fyri rómverska valdinum, sum ger tað, at hann staðfestir deyðadómin, heldur veiklyndi hansara móti óndskapi forfylgjaranna.

Men hvat er tað sum birtir undir teir sum vilja gera Jesu til kong? Og hvørjir eru teir sum vilja gera tað?

Í mótstøðupartinum eru ikki bert einstakir menn, heldur er talan um heilar klassar millum fólkið. Tað er talað um høvuðsprestarnar, fólksins elstu, Herodesarmenn og Farisearnir. Og tá verður greitt, at allir yvirklassar tjóðfelagsins, sum á ymsan hátt vóru mótstøðumenn, sameinast í mótstøðuni móti Jesu. Og tá eru eingir uttan undirklassarnir eftir til at vera teir, sum vilja gera Jesu til kong. Tað bendir í tað ætt, at øsingin, sum verið hevur um Jesu, hevur verið klassakampur, og undirklassarnir hava hyldað Jesu sum oddamann sín. Og ein av teim klagum, sum fram eru bornar móti Jesu styrkir hetta almikið. Hon ljóðar soleiðis: »Hann uppøsir fólkið við tí sum hann lærir um alla Judeu, líka frá Galileu, har sum hann byrjaði og higar«. Teir fylgja slóðini — allastaðni reisist sama øsingaraldan, hvar sum hann kemur og flytur boðskap sín.

Tað er vituligt, at har sum slík kærumál eru løgd fram, har fylgir eisini kravið um deyðadóm. Aldri tykist slík atstøða at vera til at grípa í teymarnar, sum tá kúgaðir fólkaflokkar eru østir til uppreistar. Um gruni hevur fallið á einhvønn, at hann hevði voldað tað, tá hava dagar hansara ofta verið skjótt taldir.

Og nú er at kanna eftir, um vísast kann á nakað í boðskapi Jesu ella framkomu, sum hevur voldað tað, at uppreistarhugur vaknaði millum fólkið móti teimum ráðandi.

(Framhald.)

Givið út av socialdemokratiskum felagum.
Blaðstýrari: M. S. Viðstein.
Prentsmiðja »Føroya Social-Demokrat«s, Tórshavn.

VI.

Hermannalið — javnaðarlið.
Ein harður dystur.

Aftaná 1848 kom konga- og ríkmannavaldið omanáaftur í Týskalandi og alt arbeið fyri fólkafrælsi mátti havast í loyndum. Serstakliga var ein flokkur av teimum, sum staðið hevði á odda javnaðarmanna samankomin í Sveits, har teir eina tíð kundu starva í friði: *»Neue Rheinische Zeitung«* mátti ganga inn. Marx fluddi til Paris og síðani til Londonar. Engels tók til vápna og var eina tíð uppi í teimum, sum bardust fyri frælsi í Baden og Pfalz; men so rýmdi eisini hann til Londonar.

Hóast hitt hægra borgaraliðið við kongum og fúrstum nú hevði sigrað, gekk tað smátt við at skapa eitt sameint Týskaland. Eysturríkið og Proysin vildu bæði vera á odda, og forbundsdagurin í Frankfurt kundi einki gera, tí tað var ómøguligt at koma uttanum hitt proysiske valdið. Proysin hevði eisini ein útsending á forbundsdagnum frá 1851—1859, sum ikki var nakar undanstøkkingur, hann æt *Otto von Bismarck.*

Tað var ikki møguligt fyri hitt frælslynda borgaraliðið, teir sokallaðu *Liberale,* at koma til maktina heldur, tí hóast Eysturríkið og Proysen telvaðu um forsætisrættin í einum sameintum Stórtýskalandi, so vóru tey tó á einum máli um at halda ímóti teimum liberalu, og hesin flokkur hevði ikki megi til at seta seg upp ímóti Eysturríki-Proysen. At stovna eitt sjálvstætt Proysen var eisini ómøguligt vegna klandur ímillum afturhaldsflokkin og teir liberalu har.

Undir hesum viðurskiftum fer Frederik Wilhelm frá sum proysakongur vegna heilsubrek, og bróður hansara Wilhelm I verður í 1858 kongur í staðin. Hann var ein maður, sum sá hvørja leið Proysen mátti ganga fyri at náa framat valdinum, og hann visti sær ein góðan hjálparmann. Í september 1862 gjordi hann *Otto von Bismarck* til sín forsætisráðharra.

Longu meðan Bismarck sæt sum útsendingur í Frankfurt, var tað honum greitt, at skuldi Proysen verða høvuðsríki í Týskalandi mátti tað gerast tað við einum sterkum herlið. Longu tá glampaðu fyri hugsjónum hansara orðini: *„Blóð og jarn"*, sum seinni vórðu hansara opinberu loysunnarorð.

Høvuðsendamálið hjá hesi nýggju proysastjórnini var nú at styrkja herliðið og fremja oll mál, sum kundu tæna einum sterkum herliði til frama, og gera landið sjálvbjargið í krígstilfelli: Bismarck sá fyri sær í Týskalandi tvær meginrørslur, sum báðar høvdu fastar tøkur á mannahjørtunum. Onnur var tjóðskapskenslan og hin var javnaðarrørslan. Tað var honum greitt, at hann mátti rokna við báðum, og hann var brátt búgvin at taka tær báðar; men hvørja á sín hátt. Tjóð-

skapskensluna hevði Bismark vón um at vinna og nýta sum amboð fyri at fremja síni endamál við Proysen, hon kundi eldast upp sum bál undir militaristketilin og leggja eina andaliga glæmu yvir blóðið og jarnið, tí skuldi hon lívgast. Javnaðarrørslan harafturímóti var í síni instu grund ímóti tí, sum Bismarck ætlaði at fremja, við henni kundi hann ikki úttinna nakað av tí hann vildi, tí mátti hon verða kúgað og helst verða dripin.

Soleiðis byrjar tá tann bardagi millum stjórnarvald og javnaðarmannaliðið í Týskalandið, sum ikki fekk enda fyrr enn keisaravaldið small í 1918.

Hevði stjórnarvaldi ein sterkan og harðan oddamann í Bismarch, so vóru oddamenn javnaðaarmanna heldur ongar bloytur, og tí kom dysturin at vera bæði langur og strangur.

Nøvn teirra eru heimskend og vilja lýsa soleingi fáni javnaðamanna veitrar yvir fold.

Ferdinand Lassalle, August Bebel og *Withelm Liebkneckt* vóru hvør á sín hátt slóðbrótarar fyri tí javnaðarflokki, sum bjargaði Týskalandi undan deyða, tá tað hermannavaldi, sum Bismarck legði grundarsteinarnar undir, hevði stýrt tað í ólukku.

Tann javnaðarrørsla, sum Karl Marx reisti, var grundað á vísindaliga granskan og bygd upp við einum lítaleysum hugsunnarkynstri; men hon talaði ikki somikið til hitt einfalta upprunaliga hugsunarlív mannana sum til hitt bjartað vitið.

Ferdinand Lassalle birti upp í Týskalandi eina javnaðarrørslu, ið talaði beinvegis til kenslulívið. Hann var sjálvur ein eldandi sál, og hann setti við orðum sínum eld í mannahjørtuni; men hann var tó so langt sum nakar frá at flotna út í kámum talumátum, strangt vísindalig og full av